Viðmerkingar:

# Barnaansingarmálið er væl lýst



Fleiri býráðslimir havaført fram, at málið um barnaansingina í Havn als ikki var búgvið at taka støðu til, tá tað varð lagt fyri býráðið. Teir føra fram, at har vantaðu tøl, kostnaðarmetingar og framrokningar.

Hetta er kortini ikki rætt. Kostnaðarætlan og framrokning av barnatalinum í Tórshavnar kommunu fylgdu við málinum um at nøkta barnaansingartørvin ár 2003. Trivnaðarfyrisitingin gjørdi í juli mánaði í ár eina kostnaðarmeting, sum síðani tá hevur verið eitt skjal í málinum. Sama kostnaðarmeting er grundarlagið hjá Sosialu nevnd fyri at leggja málsetningin fyri býráðið.

At býráðslimir nú kappast um at fortelja fólki, at málið var ov illa lýst, vísir bara, at teir als ikki hava sett seg inn í málið. Framrokningarnar av barnatalinum vóru eisini við á býráðsfundinum. Samstundis sum býráðslimir á henda hátt siga beinleiðis ósatt, so er hetta eisini ein háan ímóti Trivnaðarfyrisitingini, sum hevur gjørt eitt stórt og grundleggjandi arbeiði fyri at lýsa málið út í æsir.

Ein teirra endurgevur eitt brot úr uppskotinum um politiskan málsetning á barnagarðsøkinum. Hann sigur, at hetta brotið ikki er búgvið at taka støðu til, og tí mátti málið aftur í nevnd. Men í uppskotinum er eisini eitt annað brot, sum hann ikki endurgevur. Hetta brotið er soljóðandi: „Kommunan skal á hvørjum ári í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini endurskoða málsetningin, soleiðis at útbyggingin støðugt er í samsvari við barnatalið í kommununi. Málið er at beina burtur bíðilistan á barnagarðsøkinum.“

Kostnaðarætlanin fyri at víðka barnaansingina í Tórshavnar Kommunu komandi árini

| | Fleiri børn | Rakstrarkostnaður | Íløgur/keyp |
|---|---|---|---|
| 2000 | 122 | | 520.000 kr. |
| 2001 | 230 | | 14.875.000 kr. |
| 2002 | 92 | | 3.700.000 kr. |
| **Tilsamans** | **444 børn** | **13.646.550 kr.** | **19.095.000 kr.** |

Seinasta brotið tryggjar, at málsetningurin verður viðgjørdur í sambandi við fíggjarætlanina, og tí var ikki neyðugt at beina málið aftur har. Um býráðslimir veruliga vildu loysa barnaansingartørvin, so høvdu teir møguleikan á seinasta býráðsfundi. Sí talvu.

Her havi eg ikki sett upp, hvar útbyggingarnar skulu fara fram. Tað skjalið er eitt arbeiðsskjal og tí ikki búgvið at almannakunngera enn.

**Elin Lindenskov,**
**býráðslimur**
**Valevni Javnaðarfloksins**
**www.lindenskov.com**

# Eru føroyingar ein vittigheit ella ein serstøk tjóð?

Tað hevði sømt seg, at Jóannes Eidesgaard nú gevur Føroya fólki eina treytaleysa umbering fyri framferðina í ST-málinum. Hartil átti hann sum fólkatingsmaður at sett fyrispurning til donsku stjórnina, um hon viðurkennir føroyingar sum tjóð.

Til Jóannes Eidesgaard, fólkatingsmann og formann Javnaðarfloksins.

Góði Jóannes.

Ársins vittigheit! Í øðrum londum halda tey um búkin, sum tey flenna! Landsstýrið setur fólkaræðið til viks!

Soleiðis ljóðaðu tíni orð út til allar føroyingar, eftir at embætismenn í landsstýrinum høvdu sent eitt bræv til ST við fyrispurningi um upplýsingar í sambandi við samráðingar um fullveldi. Tú fanst harðliga at landsstýrinum, sum nú var farið "ov langt".

Tú fanst eisini harðliga at landsstýrinum, tí vit ynsktu ein fund við aðalskrivaran hjá NATO, til tess at fáa greiði á okkara støðu og møguleikum í verjupolitikki.

**Okkara tjóðarrættindi**
Men Hvítabók staðfestir púra greitt, at føroyingar lúka allar fólkarættarligar treytir til tess at kunna nevna seg serstaka tjóð. Og nú hevur ein óheftur serfrøðingur í fólkarætti, sum hevur starvast mong ár hjá ST og hjá mannarættindafelagsskapum — Gudmundur Alfredsson — staðfest tað sama: Føroyingar eru ein tjóð, og hava rættindi sum ein tjóð.

Tað merkir millum annað, at vit hava fullan rætt til at venda okkum til altjóða samfelagið gjøgnum okkara demokratiskt valda landsstýri. Og Alfredsson sker eisini hetta út í papp:

- **Vit hava sum tjóð fullan rætt til at taka avgerð um okkara egnu lagnu á einum reellum grundarlagi**
- **Tað er diskriminerandi móti føroyingum, at Danmark ikki hevur boðað ST skrivliga frá, at vit hava rætt til fullveldi sambært altjóða viðtøkum**
- **Vit hava rætt til at samráðast um treytirnar fyri fullveldi**
- **Tað er ímóti altjóða viðtøkum, tilvitað at brúka fíggjarligt trýst í slíkum støðum**
- **Vit hava rætt at samskifta við altjóða stovnar**
- **Vit hava rætt at fáa meira javnstøðu í samráðingarnar — eitt nú við einum altjóða eygleiðara**

**Rættindi undirgrivin**
Tá danska stjórnin hevur boðað ST frá, at vit als ikki hava hesi rættindi, gevur hon heimsins fremsta stovni villeiðandi upplýsingar um okkara fólkarættarligu støðu.

Tú ert hennara avgerandi atkvøða á fólkatingi, og sostatt sjálv fortreytin fyri øllum hennara virksemi — eisini tá hon her undirgrevur okkara tjóðarrættindi. Og tú hevur stuðlað henni í føroyskum fjølmiðlum við at rópa okkara rættindi sum tjóð fyri eina "vittigheit".

**Tjóðarmál krevur eina tjóð**
Danska stjórnin hevur eisini sýtt fyri at lýsa føroyskt sum tjóðarmál í altjóða høpi.

Hetta var annars eitt krav frá bæði landsstýrinum og uttanlandsnevnd løgtingsins. Eisini Føroya Javnaðarflokkur tók undir við kravinum.

Men stjórnin noktaði. Og tann avgerandi atkvøðan hjá stjórnini — tú, Jóannes Eidesgaard! — lat ikki við seg koma.

Eg haldi hetta vera skelkandi. Men sjálvandi — tekur tú undir við sjónarmiðinum hjá stjórnini um, at føroyingar ikki eru ein serstøk tjóð við tjóðarrættindum, so skilji eg teg. Tí ein tjóð er sjálvsagt fortreytin fyri einum tjóðarmáli. Er eingin tjóð, er sjálvsagt heldur einki tjóðarmál.

**Umbering neyðug**
Spurningurin um okkara rættindi at tosa við ST og NATO og spurningurin um tjóðarmál er alt partur av sama høvuðsspurningi: Eru føroyingar ein serstøk tjóð - ella eru vit ein danskur minniluti.

Tú hevur í hvørjum einstøkum føri tikið eina støðu, ið hevur sum fortreyt, at føroyingar ikki eru serstøk tjóð.

Eg gangi út frá, at hetta er ikki tjóðskaparliga grundarlagið hjá tær og Føroya Javnaðarflokki. Tí haldi eg, at tað hevði sømt seg, um tú gavst eina treytaleysa umbering til føroyingar fyri framferðina í hesum málum.

Hartil hevði tað verið eitt áhugavert stig, um tú sum fólkatingsmaður setti stjórnini ein einfaldan fyrispurning, um danska stjórnin viðurkennir føroyingar sum tjóð.

Ger hon tað, so hava vit eisini rættindi, sum skulu virðast. Tað áttu vit í minsta lagi at verið samdir um.

Vinarliga

**Høgni Hoydal**
**Landsstýrismaður**
**í sjálvstýrismálum**

# Býráð ella bíðiráð?



Børnini bíða eftir ansingarplássum!

Gomlu okkara bíða eftir røktar- og umlættingarplássum!

Ungar familjur bíða eftir grundøkjum at byggja á!

Sinnisveik og foreldur teirra bíða eftir tryggum bústaðarmøguleikum!

Á psykiatriskum deildum bíða borgarar í vónloysi eftir at sleppa út aftur í frælsi eftir lokna viðgerð!

Skúlabørn bíða á 4. árið eftir skúlalækna!

…og vit kundu hildið fram.

Spurningurin er tí nærliggjandi, um núverandi býráð hevur rætt til býráðsheitið, um ikki rættara heitið hevði verið bíðiráð?

Legg merki til, at í flestu av hesum nevndu førum eru tað tey veiku okkara millum, sum liggja undir og verða forsømd.

Hví hava øll hesi óføru fólk, sum í dag sita í býráðnum, ikki loyst tey mál, m.a. barnaansingar, sum tey nú í bløðunum, á fundum, á internetinum v.m. siga seg kunna loysa uttan hóvasták?

Er tað rætt at lata tey halda fram at spæla býráð í fýra ár afturat?

**Jenis av Rana**

# Hús og íbúðir



Tey eru mong, sum sóknast eftir bústað í Havnar Kommunu. Tey eru eisini mong, sum fara at hava bústað í høvuðsstaðnum fyri neyðini. Men tey eru ikki heilt fá, sum aftra seg við at gera ta íløguna, sum eini sethús í Havn eru, tí hon kann binda tey á hendur og føtur.

Summi eru ikki til reiðar at taka íløguna upp á seg enn. Tey vilja umhugsa støðuna nøkur ár aftrat. Onnur hava ongar tankar um at gera íløguna yvirhøvur. Tey vilja leggja størri dent á onnur virði í hesum lívinum enn akkurát eini sethús.

Tosið um alternativa íbúðarbygging stingur seg upp av og á, men vanliga slær fólk seg til tols við, at føroyingurin vil hava síni egnu hús, og at húsini eru hansara lívsíløga.

Hetta heldur ikki longur, og tí er neyðugt at fáa gongd á aðrar íbúðarformar. Gongdin tann vegin hevur verið at hóma leingi.

Ymsir sambyggingarhættir hava verið royndir, og longu fyri 50 árum síðani varð farið undir at byggja raðhús í Havnini. Hesin byggingarhátturin tryggjaði óivað teimum, sum keyptu sær reyð raðhús við J. Paturssonargøtu, eina lagaligari íløgu enn teimum, sum bygdu stakhús.

Í dag setir tann vanligi fólkavøksturin og tann stóra flytingin til Havnar aftur stór krøv til grundstykkir. Kostnaðurin at fáa sær eitt grundstykki og síðani at byggja sær eini hús á tað, er so stórur, at nógv, sum taka hetta upp á seg, kenna seg sperd. Tað er ongin ynskilig støða.

Sjálvandi skal kommunan so væl, sum hon kann, útvega nýggj grundstykkir til sethús. Men hon hevur eisini skyldu til at umhugsa og viðgera aðrar møguleikar.

Tí er tað hugaligt, at rættilig ferð er komin á tjakið um at byggja stór hús við íbúðum av ymsari støðd til fólk at leiga. Í Tórshavnar Kommunu verður arbeitt við einum tveimum modellum.

Annað er at byggja einar 60 leiguíbúðir í triðja byggistigi á Berjabrekku, og hitt er at byggja lutaíbúðir (andeilsíbúðir) á eini trøð við Dalavegin. Leiguíbúðirnar skula bara kosta leigu. Lutaíbúðirnar skalt tú seta nakað av pengum í, men so hevur tú eisini ávís rættindi, til tú letur lutin frá tær aftur.

Fáast hesar ætlanir í lag við kommununi og øðrum sum bylgjubrótarum, verður bøtt munandi um bústaðartørv og bústaðarmynstur. Samstundis verður nakað av trýstinum tikið av grundstykkjatørvinum.

Íbúðirnar mugu sjálvsagt útvegast til ein slíkan kostnað, at tær eisini kunnu vera ein møguleiki hjá tilkomnum fólki, sum vilja sleppa úr ov stórum húsum, ið yngri fólk so kunnu yvirtaka.

**Jógvan Arge**
**valevni tjóðveldisfloksins**
**til Tórshavnar Býráð**



Viðmerkingar:

# Gamlir steggjar og ungar bøgur?



Í farnu viku fingu meira tilkomnu býráðslimirnir gjøgnum útvarpið skotið í skógvarnar frá einum av yngru javnaðarvalevnunum til býráðsvalið, at hetta vóru »gamlir steggjar oman fyri 50 ára aldur«.

Hetta munnu býráðslimir neyvan taka sær tykni av, og mangt slíkt tolir tú óivað eisini at hoyra, tá tú hevur nøkur ár á baki.

Hinvegin kann tað kanska vera hugstoytt hjá eldri borgarum/veljarum at hoyra, at alt oman fyri 50 ára aldur fær spjaldrið »gamlir steggjar«.

Hyggja vit at turru tølunum, er meira enn ein triðingur av veljarunum hesa ferð í Suðurstreymoy júst fólk oman fyri 50 ára aldur, ið sjálvandi eiga mong og góð ár eftir í sær.

Hvat kunnu so hesi vænta sær, tá »ungar bøgur« leika í og kalla alt oman fyri 50 ára aldur fyri »gamlar steggjar«?

Ongantíð betur, enn at ung, tilkomin og eldri ganga hond í hond og sum frægast royna at skapa liviligar umstøður í Tórshavnar kommunu, sum hevur størri og meira umfatandi uppgávur framman fyri sær, nú Kollafjørður eisini er komin uppí!

Men fyrsta fyritreytin má vera, at virðingin fyri hvørjum øðrum verður sett í hásæti, tí eins og tey ungu hava brúk fyri hjálpandi hond frá teimum tilkomnu og eldru, hava tey tilkomnu og eldru brúk fyri teimum ungu.

Samstundis sum vit jú øll skulu vera her, bæði »ungar bøgur« og »gamlir steggjar«, er neyðugt at læra seg samstarvsstev, tí ikki ein einasti trupulleiki verður loystur uttan gjøgnum samstarv.

Sjálvur eri eg avgjørt til reiðar at samstarva við bæði »ungar bøgur« og »gamlar steggjar«, men eg haldi, at virðingin fyri bæði borgarum, veljarum og teimum, ein skal samstarva við, má vera grundarlagið undir, skal nakað gott spyrjast burturúr!

**Heðin Mortensen**
**býráðslimur**
**sambandsvalevni til**
**Tórshavnar býráð**

# Skúlagøta í Kaldbak



Eitt brennandi ynski hjá kaldbaksfólkum hevur leingi verið at fáa eina góða og trygga farleið til skúlabørnini, ið búgva Inni á Fløtum.

Av tí at gongubreyt hvørki er í niðara ella ovara borði, noyðast børnini sum er at ganga allan vegin í og úr skúla eftir sjálvum koyrivegnum millum henda býlingin og skúlan, ið stendur longur úti í bygdini.

Hetta er sjálvandi hvørki nøkur trygg ella haldbar loysn, tí ferðslan er stundum nógv á hesum vegastrekki, og vegurin er sera smalur.

Umboð fyri býráðið og Kaldbaksnevndina hava verið á fleiri fundum við Landsverkfrøðingin um málið.

Kaldbaksvegurin er landsvegur, og tískil áliggur tað fyrst og fremst hesum stovni at loysa henda trupulleika. Men hetta hevur víst seg at vera lættari sagt enn gjørt.

Hóast viljin at finna eina ella aðra loysn ikki hevur skortað, hevur niðurstøðan hjá LV hvørja ferð verið, at peningur hvørki er ella verður tøkur til ábøtur ella møguliga breiðking av vegnum í bræði.

Upprunaliga ynskið úr Kaldbak var at fáa eina gongubreyt gjørda framvið vegjaðaranum í erva.

Men av tí at hetta varð mett at fara at smalka koyribreytina enn meira - og harvið seta børnini í upp aftur størri vanda - mæltu serfrøðingarnir hjá Landsverkfrøðinginum staðiliga frá hesi loysnini.

Eitt tilboð frá kommununi um at yvirtaka vegin (tó framvegis saman við LV - men fyri egna rokning - at royna at finna eina brúkiliga loysn), vann heldur ikki frama.

Somu lagnu fekk eisini alternativa uppskotið hjá kaldbaksfólki um at leggja eina gøtu eftir bakkanum, omanfyri vegin.

Hinvegin vendu kaldbaksfólk avgjørd tummilin niðureftir til uppskot Landsverkfrøðingsins um at gera eina gøtu eftir bønum niðanfyri vegin.

Men sum í ævintýrunum, so fær alt ein góðan og lukkuligan enda, tá samanum kemur, og so er tíbetur eisini í hesum føri.

Landsverkfrøðingurin hevur nevniliga - og tøkk fái hann fyri tað! - nú boðað kommununi frá, at hann hevur góðtikið eitt fjórða uppskot, sum kommunan og Kaldbaksnevndin funnu fram til, eftir enn eina ferð at hava stungið høvdini saman.

Uppskotið ber í sær, at ein „skúlagøta“ verður løgd ein metur ella so inn frá vegjaðaranum í ovara borði, frá býlinginum Inni á Fløtum og út til skúlan.

Eg kann í hesum sambandi heilsa og siga, at miðað verður eftir at fara undir arbeiðið skjótast tilber.

Vinarliga

**Leivur Hansen,**
**borgarstjóri**

# Heildin og staklutirnir



Kommunuvalið nærkast; tað sæst á greinunum, sum valevnini senda bløðunum, men lítið nýtt er at síggja. Lítið ítøkiligt, mest leysakast, men tað er kortini eingi skaði í tí, at hugflogið sleppur at sveima víða í nakrar vikur, um bara veljarin skilur, at talan er um hugarok og ikki veruleika.

Tað verður stillað upp politiskt. Samanumtikið tykist valið vera lítið flokspolitiskt, men merkt av einstaklingum og teirra áhugamálum.

Ì eini leygardagsdimmu t.d. sendir tann býráðspolitikarin, ið man hava sitið eina longst, sína liberalistisku(!) heilsan til øll pláss í kommununu; eisini Kollafjørður fær kvøðu, men ikki við einum orði nevnir Heðin Mortensen, hvørjar ætlanir hann hevur fyri bygdina. Eg haldi, tað hevði ikki verið meira enn rímiligt, um Heðin fortaldi kollfirðingum nú, hvat meira skal henda í bygdini, og á hvønn hátt, hann heldur, hon skal lagast til at virka saman við og í Tórshavnar kommunu. Tær nýggju bygdirnar í kommununi skulu hava somu møguleikar at menna seg og høvuðsøkið. Fái eg undirtøku, ætli eg mær at hava eitt vakið eyga við tilgongdini í Kollafirði, soleiðis at bæði vinnulívið og tað sociala lívið í bygdini fáa góðar karmar at virka í.

Tað tykist trupult at finna upp á nýggj høvuðsmál. Ein kann eisini spyrja, hví so lítið samsvar er millum tað, sum flokkarnir á tingi siga og gera, og býráðsvalevni flokkanna? Svarið kann m.a vera, at her hava vit við heilt onnur mál at gera, og hóast hetta er landsins nógv størsta kommuna, so eru viðurskiftini kortini á mangan hátt smá og ávirkilig av lítlum. Vit vita t.d. ikki, hvussu næstu 4 árini fara at roynast, men vit vóna tað besta. Eisini tey ymisku økini í kommununi gera, at vanligt floksbýti hevur hug at hvørva.

Sum kunnugt ber ikki til bæði at blása og hava mjøl í munninum. Inntøkugrundarlagið er fortreytin fyri, at kommunan orkar at loysa málini - eisini tey, ið leingi hava ligið á láni, tí fíggjarorkan var ikki til staðar. Hetta krevur, at skattainntøkan verður væl umsitin, soleiðis at vit við tíðini veruliga kunnu lækka kommunuskattin og halda fast um lækkingina.

Ein kommuna í brádligum vøkstri fær nógv dýr mál at loysa. Í løtuni er tað serstakliga tann sera stóri ansingarspurningurin, ið er frammi og trokar á, men hesin óvanliga stóri smábarnavøksturin fer um stutta tíð at gera vart við seg í fólkaskúlanum, og tí mugu fyrireikingar og munandi útbyggingar fara í gongd sum beinanvegin á skúlaøkinum.

Meira um hetta málið seinni.

**Regin av Steinum,**
**valevni Tjóðveldis-**
**floksins til býraðsvalið**

Lesarabræv

# Ikki eiti á

Kollvelting er eitt stórt orð, men tú sleppur ikki undan at brúka stór orð, tá ið tú hugsar um SPROTAN hjá Jonhard Mikkelsen.

Hesin bókaklubburin hevur longu í ár sent 7 væla bøkur til limir sínar, og tríggjar koma afturat í ár, har umframt eru komin trý stuttsøgusøvn (Finnbogi Ísakson týddi) (at lesa stuttsøgur er ikki minni gevandi og stuttligt enn at lesa skaldsøgur) og tann frálíka Orðalagslæran hjá Jeffrei Henriksen. Ikki eiti á, og so kosta tær bara 160 kr. fyri limirnar. Eisini tøknin at prenta bøkur hevur gjørt eitt risa lop. Dimmalætting hevur prentað tær og Helgi Justinussen hevur bundið tær inn. Báðar fyritøkurnar hava rós uppiborið. Helmingurin av bókunum eru skrivaðar í nítiárunum og týddar til bókaklubban. Hóast tú hevur lisið tær báðar Aftur á slóðina (Hans Thomsen týddi) og Fjúrtan dagar fyri frostnætur (Finnbogi Ísakson týddi), mátti tú lesa tær aftur, nú tú hugdi niður í tær. Hinar fimm eru afturlítandi sjálvsævisøgur og ættarsøgur. Lívsins aks hjá Sven Delblanc (Jákup í Skemmuni hevur týtt) hevur undirheitið: Barnaminnir. Sera vælskrivaðar endurminningar. Kanska herskin og opinskárað frásøgn, men tú ivast ikki í, at her er ein stórur høvundur, ið vil skera inn á bein í endurminningum sínum, hóast tað pínir og verkir.

Tær fýra eru skrivaðar av kvinnum í ymsum aldri og frá tveimum londum, Svøríki, USA-Kina. Eydnufelagið (Turið Sigurdardóttir týddi) munnu flest komast við, hon varð lisin upp í Útvarpinum, men hon tolir at verða lisin. Her er nógvur lívsvísdómur og poesiur, sum skal lesast eisin fleiri ferð.

Ein vetur í Stokkhólmi og Áðrenn tú sovnar hevur Jákup í Skemmuni týtt og tað seinnu hevur Linn Ullmann, dóttir ta kendu Liv Ullmann og tann ikki minni kenda Ingmar Bergmann, skrivað. Tær báðar liggja í kjalarvørrinum á tí nú so kenda »kvinnuskaldskapinum«. Hvørgin teirra ber nakað nýtt fram. Tú hevur lisið hetta ofta fyrr, men eitt ávíst undirhald er tað sjálvsagt, og tær eru lætt lisnar. Tó ivast tú í, um tann hjá Linn var komin út og lisin so nógv, um hennara kendu foreldur ikki áttu ein týðandi part av søguni, men hon skrivar um sítt egna lív. Slatur er altíð slatur, ikki bara í Føroyum, og hevur sítt virði so ella so.

Beint nú havi eg lisið ta seinastu: Anna, Hanna og Jóhanna hjá Marianne Frederiksson (Jákup í Skemmuni týddi). Hóast sínar 359 síður er hon skjótt lisin. Hon lesur seg mest sum av sær sjálvum, og tú skilir, at hon er nú millum mest seldu bøkur í Europa, tí henda søgan, sum fevnir um trý ættarlið av kvinnum, er væl fortald.

Óivað verður hon flokkað millum kvinnubókmentirnar, men her er ein annar tóni, ein leitan og roynd at skilja bæði kynini. Einki »frelst« ella frammanundan lagdar ætlanir og hugtøk, sum skulu prógvast. Hon hevur eina søgu, ið má sigast. Í so máta líkist hon Eydnufelagnum, sum er um tvey ættarlið av kinesiskum amerikanarum.

Jú, eg hyggi eisini í sjónvarpið, men tað er vælsignað at hava eina bók liggjandi, hon fer ongan veg.

Anna, Hanna og Jóhanna stóð seg væl í kappingini við skýggjan. Ja, tað var bara Dagur og vika, sum var kappingarfør.

Nú mundi eg gloymt málið. Eg eri nú so mikið gamal, at tað líkasum situr í einum, hatta við málinum. Tosaði ella skrivaði tú um eina bók, varð altíð okkurt sagt um málið. Sigast má um allar fýra týðararnar, at teir hvør í sínum lagi megna at handfara móðurmálið so mikið væl, at tú hugsar ikki um tað. Tú steðgar ikki á. Soleiðis skal tað vera. Tøknin gongur í sjeymílastyvlum, men tað skal ein eldsál sum Jonhard Mikkelsen til at fáa hana at bera okkum so nógvar bøkur á føroyskum og tað alt í einum ári.

**Steinbjørn B. Jacobsen**